Hoyvíksvegur 61
100 Tórshavn
Faroe Islands
Tlf: +298 610140
barnabati@barnabati.fo
www.barnabati.fo

LM-002/2026 – Broyting í løgtingslóg um familjuískoyti

Fokus á børnini – ikki bara inntøkutølini

Barnabati tekur væl ímóti ætlanini um at styrkja fíggjarligu korini hjá familjum við lágari inntøku.
Vit meta uppskotið út frá einum barnarættinda- og barnavælferðarsjónarhorni.

Hvat merkir broytingin fyri børn, sum vaksa upp í familjum við lítlum fíggjarligum rásarúmi?

Barnarættindasáttmálin leggur dent á barnsins besta, sosiala trygd og eitt livistøði, sum stuðlar undir kropsligari, sálarligari og sosialari menning.

1 | Sperd fíggjarstøða merkist í gerandisdegnum hjá barninum

Úr Barnaverkætlanini *Har børn og ung trívast* kemur ein greiður boðskapur frá børnum, sum vaksa upp í fátækaváða og øðrum viðbreknum lívsstøðum.

Børnini og tey ungu lýsa, hvussu tað kennist **at mangla tað, sum onnur børn taka fyri givið**, og at kenna seg øðrvísi á ein keðiligan hátt. Samstundis leggja tey dent á, at hjálpin eigur at koma tíðliga og á ein hátt, har tey ikki verða útstillað.

Tey siga eisini heilt ítøkiliga:

Tað eigur ikki at forða okkum fyri at luttaka í frítíð og felagsskapi, um familjan hevur lítið av pengum.

Og tey ynskja, at øll børn hava javnbjóðis atgongd til grundleggjandi viðurskifti sum **mat, klæðir, bústað, heilsu og frítíð**.

Ein annar sera sterkur boðskapur frá teimum serliga útsettu børnunum er ynskið um:

at kunna luttaka í ítrivum og vera við sum hini, sjálvt um man ikki hevur nógvar pengar.

- í føðingardøgum og sosialum tiltøkum
- í skúlatiltøkum og útferðum
- í felagsskapi við javnaldrum – og í tí vanliga barna- og ungdómslívinum

Hetta samsvarar við høvuðsniðurstøðuna í Barnaverkætlanini: børn og ung leggja dent á **tryggleika, at hoyra til, meiningsfulla frítíð og javnbjóðis møguleikar**, og at stuðul skal koma rættstundis og eftir veruligum tørvi – óheft av bakgrund og lívsumstøðum.

Tá fíggjarliga rásarúmið er ov lítið, kann barnið stigvíst verða avmarkað í sínum møguleika at luttaka í sama gerandisdegi sum onnur børn.

2 | Ansið eftir teimum, sum detta ímillum

Barnabati tekur væl ímóti, at inntøkumørkini verða hækkað. Samstundis er týdningarmikið at hyggja at familjunum kring mørkini. Ein familja verður ikki brádliga fíggjarliga væl fyri, tí ársinntøkan er eitt sindur hægri enn eitt ásett mark.

Hvørji børn verða loftað av broytingini – og hvørji børn detta framvegis ímillum?

Umsóknir um fíggjarligan stuðul frá foreldrum, sum eru lesandi, rakt av sjúku, hjúnaskilnaði og øðrum brádliga íkomnum støðum.

3 | Ogn á pappírinum er ikki altíð fíggjarligt rásarúm

Barnabati tekur ikki støðu til eina ávísa upphædd fyri ognarmarkið. Men ogn á pappírinum gevur ikki altíð eina rættvísandi mynd av, hvussu nógv familjan í veruleikanum hevur at liva fyri hvønn mánað. Familjur kunnu hava høgar fastar útreiðslur og lítið gjaldføri, hóast tær hava eina ogn.

Inntøku- og ognarmørk eiga ikki ótilætlað at útiloka børn í familjum, sum í veruleikanum hava lítið fíggjarligt rásarúm eitt nú av serliga íkomnum støðum.

4 | Stuðulin skal vera lættur at fáa

Ein stuðulsskipan hjálpir bara teimum, sum fáa atgongd til hana. Familjur, sum eru fíggjarliga ella sosialt sperdar, hava ikki altíð yvirskot til at finna fram til stuðulsskipanir, umsóknir og freistir.

EINFØLD • GREIÐ • LÆTT ATKOMILIG • MEIRA SJÁLVVIRKANDI (um møguligt)

Barnabati mælir til, at nevndin hyggur nærri eftir avleiðingunum fyri børn:

- **Hvussu nógv børn verða veruliga hjálpt av broytingini?**
- **Hvørji børn og barnafamiljur detta framvegis ímillum?**
- **Og er stuðulin nóg lættur at fáa hjá teimum familjum, sum hava størsta tørvin?**

HVAT GER UPPSKOTIÐ FYRI BØRNINI?

Tað eigur, saman við fíggjarligu kostnaðarmetingini, at vera ein grundleggjandi spurningur í viðgerðini.